

## Netrænarar vilja keypa Sealand

Síðani lítla Sealand, ið liggur 10 km úr ensku Onglandi, varð lýst til sølu, hava fleiri áhugaðir keyparar verið. Ein teirra er svenska Pirate Bay, sum við hesum ætlar sær at finna eitt friðskjól fyri teimum, sum støðugt toga net-rænarar í rættin. Pirate Bay er farið undir innsavnan, og hevur lovað teimum, sum stuðla, at fáa statsborgaraskap í landinum.

## 100 mió Explorer-brúkarar

Síðani Internet Explorer 7.0 varð send á marknaðin í oktober mánaði, er kagin tikin niður av ikki færri enn 100 mió brúkarum. Websidestory, sum greinar ferðsluna á netinum, sigur, at í dag nýta á leið 25% av øllum brúkarum Explorer 7. Tað er tó langt í frá eins nógv sum gamla útgávan av Explorer. Mett verður, at 62% av brúkarunum enn nýta ta skipanina.

# Boring við markið helst positiv

**Chevron hevur nú borað tann fyrsta av trimum brunnum á Rosebankleiðini**

OLJUBORING

*Jan Müller*

*jan@sosialurin.fo*

Í góðan mánað hava oljufeløgini Chevron, Statoil, Dong og OMV bora ein sera týdningarmiklan brunn í bretskum øki, skamt frá føroyska markinum. Hetta er tann fyrsti av trimum avmarkingar- og metingarbrunnum á tí nógv umrødda Rosebank/Lochnagar oljufundinum, ið varð gjørt fyri tveimum árum síðani. Og sum verður mett at vera eitt stórt oljufund, og um væl vil til í hesi boriverkætlanini, so kann hetta enda við eini útbygging, sum tá fer at liggja tætt upp at føroyskum øki. Og harvið bæði óbeinleiðis og beinleiðis fáa stóran týdning fyri framtíðar leiting og møguliga framleiðslu á okkara landgrunni.

Okkurt kundi bent á, ljóðar tað frá oljuumhvørvinum í Aberdeen, at henda síðsta boringin sær út til at hava givið eitt positivt úrslit. Enn er tó ov tíðliga at gera niðurstøður, tí stutt er fráliðið í hesi stóru boriætlan. Ein av trimum brunnum er boraður. Talan er um at staðfesta, um Rosebank er eitt stórt oljufund, ið fyrstu brunnarnir hava víst. Nú seinasta boringin á føroyska landgrunninum varð eitt vónbrot eru øll eygu í oljuheiminum vend móti brunnunum, ið verða boraðir á Rosebankleiðini. Chevron, ið er eitt tað mest virkna á Atlantsmótinum, hevur góðar vónar til økið og hevur gjørt stórar íløgur í leitingina. Eisini er felagið við at byggja boripall og boriskip, ið skulu bora á Atlantsmótinum komandi árini. Chevron fekk annars sítt fyrsta loyvi á føroyska landgrunninum í 2. útbjóðing í fjør.

Felagið hevur eftir øllum at døma gjørt eitt stórt fund í basaltløgum einar 15 fjóðringar frá føroyska markinum. At gera oljufund í basaltløgum er rættiliga óvanligt, og tí er eisini sera stórur áhugi fyri boringunum millum altjóða oljufeløg, ið framvegis trúgva uppá Atlantsmótið. Tað eru tey oljufeløg, ið halda, at Atlantsmótið, ið eisini Føroyar eru partur av, kunnu blíva ein nýggjur Norðsjógvur í oljuhøpi. Spurningurin er bara um tíð. Áhugavert er at býta merki í, at feløgini, ið eru við í boringunum á Rosebankleiðini á bretska landgrunninum, eisini eru við í leitingini við Føroyar. Vánalig úrslit á Rosebank og hjá BP á Williamleiðini í summar kunnu gerast stórt afturstig fyri oljuleiting við Føroyar. Men sum longu umrøtt so kunnu positiv úrslit á hesum báðum leiðum ella eini teirra fáa alstóran týdning fyri framtíðar oljuleiting á Atlantsmótinum. Og so skulu vit heldur ikki gloyma spennandi brunnin, Anne Marie, sum ENI og Føroya Kolvetni fara at bora í 2008 á føroyska landgrunninum.




*Rosebank/Lochnagar oljufundið liggur stutt frá føroyska markinum. Hini gulu økini inni í sirkulinum eru loyvi, har Chevron er fyristøðufelag og har borurin helst verður settur í í næstu framtíð. Stórt boriskip og pallur verða í løtuni bygd til at bora á m.a. hesum leiðum. Leggið til merkis, at loyvið 008 á føroyska landgrunninum er eisini við.*

*Kelda Chevron.*

# Visjónin má ikki byggja á oljupengar

**Sskal Visjón 2015 verða treytað av oljupeningum, eigur henda at verða tikin av skránni skjótast gjørligt. Við nógvum pengum fer ongin yvirhøvur í Føroyum at arbeiða málrættað við visjónum, langtíðarmálum og strategi - tað fer at verða arbeitt frá sak til sak, dag til dag o.a. sigur Reidar Nónfjall, stjóri.**

VISJÓN OG OLJA

*Jan Müller*

*jan@sosialurin.fo*

Síðani tíðindastubbin um BP-boringina á landgrunninum í summar og hvønn týdning eitt møguligt oljufund kann fáa fyri eitt nú eina ætlan sum Visjón 2015 stóð á lesa á Portalinum í vikuskiftinum hava vit fingið viðmerking frá einum av teimum, sum javnan er at síggja sum viðmerkjari í miðlunum til ymisk samfelasmál. Tað er Reidar Nónfjall, stjóri á Føroya Handilsskúla. Hann sigur við Sosialin, at umrødda útmelding um, at eitt oljufund í ár kann koma at geva eitt nú Visjónsætlan landsstýrisins eitt ordiligt skump, er ein løgin útmelding og spyr: -Merkir hetta, at verandi politiska visjón 2015 er órealistisk og er fult treytað av oljupengum - tí landið hevur sum er, ikki fíggjarliga orku til at gjalda tað, sum visjón 2015 kostar. Hinvegin so veit ongin í Føroyum, hvat fíggjarliga avleiðingarnar verða í sambandi við visjón 2015 - rakstur og íløgur sigur Reidar Nónfjall.



*-Ongin kennir enn fíggjarligu avleiðingarnar av Visjón 2015*

Hann vísir víðari á, at lond, sum hava funnið olju hava tað ikki bara gott - tvørturímóti virka oljuinntøkur á sama hátt sum ríkisveitingin - tvs. ongin realproduktión aftanfyri og tí ein peningagáva. Hetta hevur eina sera ósunna ávirkan á veik og undirment samfeløg og sum politisk eru óstabil - Alaska er eitt dømi uppá slíka negativa ávirkan.

Norra er eisini eitt samfelag, sum fær ringan karakter frá altjóða serfrøðingum innan innovatión - tosað verður um, at Norra livir í einum følskum ríkidømi. Danmark harafturímóti fær sera góð ummæli, tí, at danir eru eitt vitanarsamfelag og har sera nógv orka verður brúkt til innovatión og gransking - produktmenning, nýggjar vinnur, globalisering o.a..

Reidar Nónfjall sigur víðari, at um so er, at visjón 2015 er treytað av oljupeningum, eigur henda at verða tikin av skránni skjótast gjørligt. Við nógvum pengum fer ongin yvirhøvur í Føroyum at arbeiða málrættað við visjónum, langtíðarmálum og strategi - tað fer at verða arbeitt frá sak til sak, dag til dag o.a. Hann heldur fram:

- Tað skal ein sterkur ryggur at bera góðar tíðir, og royndirnar vísa, at tað megnaðu føroyingar ikki við táverandi fiskiríkidømi í 1980´unum. Stórar inntøkur kunnu merkja volumusjúku og at politikarar o.o. missa tamarhaldið á útreiðslunum hjá tí almenna - tí má ein løg gerast fyri ein oljugrunn skjótast gjørligt - m.a. eisini fyri at tryggja okkara eftirkomarar.

Men, hvat ongin olja er funnin enn, so lat okkum útnytta tíðina sum er, til at bera okkum ábyrgdarfult og rationelt at. Vísir tað seg, at olja verður funnin í rakstraverdum nøgdum, ja so eru vit fyireikað at brúka vit og skil - verður ongin olja funnin, so eru vit eisini fyrireikað til tað.

Verður eitt oljuríkidømi ikki umsitið rætt og gott, er stórur vandi fyri, at tað kann virka sum ein bremsa og sovikoddi fyri allari framtíðar menning í Føroyum sigur Reidar Nónfjall og leggur aftrat:

- Vit muga minnast til, at Føroyar partvíst enn eru eitt veiðusamfelag, sum hugsar nógv í løtuvinningi.